UTTAN ÚR HEIMI

## Bangnir fyri rakettum

Altjóða floghavnin í irakska høvuðsstaðnum Bagdad hevur ikki verið opin, síðani amerikanararnir hersettu hana undir Irak-krígnum. Sambært The New York Times tora amerikanararnir ikki at lata hana upp, tí teir sakna framvegis eitt rættiliga stórt tal av rakettum av slagnum Stinger.

Síðani amerikanararnir og bretarnir róku stýrið hjá Saddam Hussein frá, hava teir savnað alskyns vápn, og hesa tíðina hava teir fingið fatur á 317 rakettum, sum eru so smáar, at ein maður kann bera tær. Amerikanska herleiðslan veit ikki, um hon hevur fingið allar rakettirnar, tí hon veit ikki, hvussu nógvar tílíkar rakettir irakar høvdu undan krígnum.

Stinger-rakettirnar kunnu millum annað skjóta flogfør niður, og tá amerikanararnir ikki vita, um irakskir mótstøðubólkar kunnu hava slíkar rakettir, tora teir ikki at lata altjóða floghavnina í Bagdad upp. Harafturat bera amerikanararnir ótta fyri, at mótstøðubólkarnir kunnu smugla Stinger-rakettir um markið úr grannalondunum.

## Heimsins størstu bingjuskip

Kanadiska reiðaríið Seaspan Container Lines hevur nú bílagt átta bingjuskip, sum verða tey størstu av sínum slagi í heiminum. Skipini skulu byggjast á einari suðurkoreanskari skipasmiðju, og tey fara at taka 9500 bingjur hvørt. Tað fyrsta verður ætlandi sett í sigling í 2006.

Tað er eitt sindur óvist, hvussu nógvar bingjur tey størstu skipini, sum nú eru í sigling, kunnu taka. Danska reiðaríið A. P. Møller, sum eigur fleiri stór bingjuskip, hevur alment upplýst, at tey størstu skipini hjá felagnum taka 6000 bingjur, men onnur halda, at tey í veruleikanum kunnu taka 8000 bingjur, og tað hevur A.P. Møller ikki avsannað, skrivar Jyllandsposturin.

Tað er eisini hugsandi, at A.P. Møller ætlar at byggja skip, sum verða uppaftur størri enn tey kanadisku. Lindø-skipasmiðjan er í ferð við at byggja fleiri bingjuskip til reiðaríið, og tað er ikki óhugsandi, at okkurt teirra verður størri enn tey hjá Seaspan Container Lines.

## Barnahermenn tiknir

Stjórnarherurin í Filipsoyggjunum hevur tikið meiri enn 170 børn, sum vóru hermenn hjá kommunistisku uppreistrarrørsluni NPA.

Sambært keldum hjá stjórnarherinum er talan um 122 dreingir og 50 gentur. Flestu teirra arbeiddu sum sendiboð ella sjúkrarøktarar hjá uppreistrarherinum, men onnur virkaðu sum njósnarar og sum veruligir hermenn. Sambært keldunum eru børnini send til ymsar almennar stovnar, har tey annaðhvørt skulu ganga í skúla ella fáa lønt arbeiði.

Myndugleikarnir í Filipsoyggjunum hava í fleiri ár skuldsett kommunistisku uppreistrarrørsluna fyri at bróta altjóða bannið ímóti at nýta børn sum hermenn, men sambært stjórnini letur rørslan ikki atfinningarnar við seg koma.

## Sleppa USA

Danska bryggjaríið Carlsberg sigur sít øl vera tað besta í heiminum, men kortini hevur bryggjaríið valt at síggja burtur frá amerikanska marknaðinum.

Orsøkin er ikki, at amerikanararnir ikki leggja í Carlsberg, men heldur tann, at tað er sera dýrt at marknaðarføra eina vøru í USA. Niðurlendska bryggjaríið Heineken nýtir næstan eina hálva milliard krónur um árið at marknaðarføra sítt øl á amerikanska marknaðinum, og tey bæði stóru suðurafrikonsku bryggjaríini SAB Miller og Anheuser-Busch nýta meiri enn fýra milliardir krónur um árið bert til marknaðarføring í USA.

Amerikanararnir halda tað vera løgið, at Carlsberg ger so lítið burtur úr sær í USA, men leiðslan í danska felagnum hevur ta áskoðan, at tað ber væl til at gera seg galdandi á heimsmarknaðinum uttan at gera seg galdandi í USA. Tað er ein hugsunarháttur, sum amerikanararnir hava ilt við at skilja.

# Norðmenn hava olju fyri 1000 milliardir meiri enn higartil mett

**Nýggjar metingar hjá Statoil vísa, at tað er nógv meiri olja eftir á norska landgrunninum enn higartil hildið.**

OLJA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri aðru ferð í tveir mánaðir er almenna norska oljufelagið komið við góðum tíðindum um oljumøguleikarnar á norska landgrunninum. Fyri tveimum mánaðum síðani kunngjørdi felagið, at tað hevði funnið eina sera stóra oljuleið á Ellida-leiðini, og í gjár boðaði felagið frá, at tað eru nógv meiri olja og gass undir norska havbotninum, enn serfrøðingar higartil hava mett.

- Vit halda, at tað eru 28,3 milliardir rúmmetrar av olju og gassi í goymslum, sum vit ikki hava funnið enn. Talan er serliga um øki á djúpum vatni í Noregshavinum, sigur leitistjórin hjá Statoil, Tor Fjæran, við Aftenposten. Her kann verða nevnt, at so seint sum í juni metti norska oljumálaráðið, at einir 22 milliardir rúmmetrar eru í økjum, sum ikki eru funnin enn. Við dagsins olju- og gassprísi svarar munurin til meiri enn 1.000 milliardir norskar krónur.

Tor Fjæran sigur, at Statoil gjørdi ta nýggju metingina, áðrenn felagið fann ta stóru goymsluna á Ellida-leiðini, og hann heldur, at tað fundið staðfestir metingina hjá felagnum.

# Skal stýra ríkum stati í stórari neyð



**Hevði Kalifornia verið eitt sjálvsstøðugt land, hevði Arnold Schwarzenegger verið sjálvskrivaður við fundarborðið hjá heimsins ríkastu londum. Men superstaturin er í stórari kreppu.**

KALIFORNIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er ikki ein vanligur amerikanskur guvernørstólur, sum Arnold Schwarzenegger er komin at sita í. Bruttu"tjóðar"framleiðslan í statinum er 1,4 billiónir dollarar (1,4 milliónir milliónir dollarar). Tað ger, at Kalifornia er tann fimtastørsta búskapareindin í heiminum. Hann er eisini tann størsta búskapareindin í USA og harafturat landsins týdningarmesti landbúnaðarstatur.

Men so er eisini alt tað góða sagt um Kalifornia, tí búskapurin í statinum er í svárari kreppu. Í fjør hevði staturin eitt hall upp á 38 milliardir dollarar ella 7.000 krónur fyri hvønn einasta av teimum 35 milliónum íbúgvunum.

Í sjey ár var framburður í búskapinum, men seinastu trý árini hevur tað gingið hinvegin. Tað er hesari gongdini, Arnold Schwarzenegger skal venda. The Terminator fær tí úr at gera.

ítróttur
Nr. 191 • hósdagur • 9. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# NSÍ smádreingirnir aftur tvær ferðir gull



*NSÍ smádreingir. FM vinnarar og steypavinnarar 2003. Standandi frá vinstru: Andrass Olsen, liðleiðari, Trygvi Mortensen, venjari, Arnold T. Davidsen, Jan Niclasen, Sveinur Nielsen, Robert Sørensen, Hanus Jacobsen, Rógvi Højgaard, Klæmint Olsen, Øssur Dalbúð, Meinhard Dalbúð, venjari. Húkandi frá vinstru: Dávid Jacobsen, Gi Rasmussen, Eyðstein Joensen, Petur á Roykheyggi, Jann Martin Mortensen, liðformaður, Petur Meinhard Magnussen, Eli Mikkelsen, Jens Joensen og Filip E. Jacobsen*

**Annað árið á rað hava evnaríku smádreingirnir hjá NSÍ megnað at vunnið bæði landskappingina og steypakappingina**

FØROYAMEISTARAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eina ferð mitt í summar høvdu vit frásøgn frá steypakappingini í smádreingjadeildini. Tá snúði søgan seg um, at NSÍ smádreingirnir høvdu vunnið steypakappingina. Finaluna vunnu teir 1–0 á B36. Tann finalan varð spæld í Gøtu.

Nú hava NSÍ smádreingirnir aftur vunnið gull. Hesa ferð er tað í landskappingini. Og tað var ikki við mýkindum, at evnaríku 12–14 ára gomlu NSÍ ararnir fóru ígjøgnum hetta kappingarárið. Teir taptu einans tveir dystir. Talan var um tveir landskappingardystir, sum vórðu spældir í undanumfarinum. Tá ið hesir dystirnir vóru á skránni, var tað longu greitt, at NSÍ hevði tryggjað sær pláss í endaumfarinum.

Eftir summarsteðgin var NSÍ rættuliga sannførandi. Teir vunnu allar dystirnar, og fjarstøðan frá gullplássinum og aftur til hini boðar frá, at talan hevur verið um eitt lið, sum so at siga hevur verið í flokki fyri seg sjálvt. HB smádreingirnir fingu silvurmerkini. Teir vóru tíggju stig lakari enn NSÍ.

Venjarar hjá smádreingjunum hava verið Meinhardt Dalbúð og Trygvi Mortensen, sum nú eru komnir í tann aldurin, at teir eiga spælarar á hesum liðnum. Venjararnir báðir vóru í síni tíð kendir fótbóltsspælarar. Meinhardt var rættuliga málsøkin álopsspælari. Hann tráddi sínar fótbóltsskógvar í Fuglafirði, har hann var á unglingaliðnum, sum vann FM í 1975. Blaðungur kom hann á besta liðið, og toppin rakk hann longu í 1979. Tað árið vann ÍF fyrsta og higartil einasta FM heitið, og Meinhardt Dalbúð var toppskjútti í 1. deild. Seinni var Meinhardt í Danmark og so í B36. Hann hevur verið venjari á Skála, í Leirvík og í barndómsfelagnum í Fuglafirði.

Trygvi Mortensen spældi altíð við NSÍ. Hann var stundum málverji og stundum var hann úti á vøllinum – bæði á miðvøllinum og í miðverjuni. Hann hevur fleiri ferðir verið venjari hjá NSÍ í 1. deild, hann hevur havt ábyrgdina av unglingaliðnum, í fjør var hann venjari hjá EB/Streymi í 1. deild, og í ár hevur hann, umframt at venja smádreingjaliðið, verið hjálparvenjari í 1. deild.

Sjálvandi fegnast smádreingirnir í Runavík um, at tað í ár eydnaðist teimum at vinna báðar kappingarnar. Tað er kortini ikki nakað nýtt, at nógvir av hesum dreingjunum vinna. Í fjør vunnu teir eisini bæði landskappingina og steypakappingina í smádreingjadeildini.

Sjálvandi ber tað ikki til at siga nakað um, hvussu tað fer at roynast næsta kappingarár. Men tað er einki at ivast í, at NSÍ tá fer at vera við í kappingini um heiðursmerkini bæði í dreingjadeildini og í smádreingjadeildini. Næsta ár fara teir dreingirnir, sum í fjør vunnu báðar kappingarnar í smádreingjadeildini, at spæla saman í dreingjadeildini.

Í NSÍ hava teir tað seinasta árið lagt nógva orku í at menna bestu spælararnar. Ábraham Løkin hevur staðið fyri talentvenjingini, sum teir rópa hesar servenjingarnar, har evnaríkir spælarar úr fleiri aldursbólkum venja saman. Ætlanin er at halda á við hesum venjingunum í vetur.

Ítróttarsosialurin ynskir NSÍ smádreingjunum hjartaliga tillukku við øllum gullinum.

